# Steyp og handan av fótbóltsvølli



**Um vikuskiftið verður Sundalagsstevnan í Hvalvík. Er tað nakað sum savnar fólkið í økinum man tað vera fótbóltsfelagið EB/Streymur**

**Fótbóltur:** Hetta felagið fer eisini at gera vart við seg um vikuskiftið - bæði á vølli og uttanfyri vøllin.

Í fyrsta lagi er talan um ein dyst í Formula-kappingini leygarkvøldið. Tá hittast tvey lið í hvør sínum enda á stigatalvuni - EB/Streymur og KÍ.

Umframt tey trý stigini sum standa uppá spæl í dystinum, verður eisini spælt um eitt steyp til ognar.

Sunnudagin kl. 15, tá dystir vanliga verða leiktir, verður eingin dystur. Hinvegin fer ein hending fram á vøllinum, sum fer at verða fótbóltinum at gagni í framtíðini.

Tá fer nevniliga borgarstjórin, Heðin Zachariasen at handa fótbóltsfelagnum nýggja felagshúsið við vøllin,

Í hesum sambandi fer hann sjálvur og Asbjørn Djurhuus, formaður í trivnaðarnevndini í Sunda kommunu at halda røðu.

Hetta tiltakið endar kl. 18.

sb.

## Jana setur stevnuna

**Hvalvík**: Á summum stevnum er vanligt at tær verða settar beint undan kappróðrinum.

Á Sundalagsstevnuni í Hvalvík verður stevnan sett longu fríggjakvøldið kl. 19.

Tað verður bygdaráðslimurin úr Hvalvík, Jana Mouritsen sum fer at seta stevnuna.

Við hetta høvið spælir Eiðis Ljómfelag. sb.

## Tobbi talar á midnátt

**Hvalvík:** Eingin stevna uttan eina samkomu á midnátt.

Soleiðis verður eisini í Hvalvík, har løgtingsmaðurin, Torbjørn Jacobsen fer at halda røðu.

Aftaná hetta verður fýrverkarí. sb.


ALT TILFAR
til nógvar góðar løtur



– keyp meira
fyri minni

opið er leygardag 11-14
annars eftir avtalu.

ÍTRIVSKURVIN
Oyrarvegur 3 · 450 Oyri
tel 21 33 38 · 310890 · 222079
itrivskurvin@post.olivant



